Í FØROYUM

# Kokkaskúlin



Kokkaskúlin í Klaksvík er sum orðið sigur, ein skúli fyri kokkar. Skúlin gevur fyrst og fremst førleikar til kokkaarbeiði umborð á skipi, men fleiri eru tey, ið við pappírunum eru farin á dagstovn og røktarheim at arbeiða sum kokkar.

Kokkaskúlin tekur næmingar inn tvær ferðir um árið. 12-14 næmingar eru vanliga í hvørjum flokki. Flestu næmingarnir eru mannfólk, og øll hesi árini, Kokkaskúlin hevur havt undirvísing, hevur tað bara verið eitt ár, har kynsbýtið hevur verið javnt.

Undirvísingin á Kokkaskúlanum í Klaksvík er eitt grundskeið. Tað gevur ikki atgongd til víðari útbúgving sum kokkur, men gevur møguleika til kokkaarbeiði á landi og sjógvi, har tað sjáldan eru krøv til útbúgving á økinum. Undirvísingin er blandað við praktiskari og teoretiskari undirvísing. Undirvíst verður í føroyskum, donskum, enskum og rokning, umframt føðslulæru, reingerð og proviantering. Tveir undirvísarar eru í matgerð, meðan lærarar frá Sjómansskúlanum undirvísa í hinum lærugreinum.

Kokkaskúlin í Klaksvík heldur til á Sjómansskúlanum á Garðavegnum í Klaksvík.

Arbeitt verður í løtuni við eini kunngerð, sum gevur kokkum frá Kokkaskúlanum møguleika at søkja um merit, um teir ynskja at fara undir víðari lesnað.

Skúlin er at finna á
www.klaknav.fo

# Heilsuskúlin

Á Heilsuskúla Føroya kanst tú útbúgva teg til Heilsuhjálpara og Heilsurøktara.

Heilsuhjálparaútbúgvingin tekur 1 ár og 3 mánaðir, har skift verður ímillum at vera á skúla og úti í starvsvenjing á stovnum og røktarheimum. Til heilsuhjálpara krevst 9. flokkur + eitt ára starvsroyndir ella 10. flokksprógv. Sum útbúgvin heilsuhjálpari, kanst tú útbúgva teg víðari til heilsurøktara. Starvspláss hjá heilsuhjálparum eru til dømis Nærverkið, Ellis- og røktarheim, Sambýli, Sum stuðul

Í Heilsurøktaraútbúgvingini, sum tekur 1 ár og 10 mánaðir, er helvtin ástøði og helvtin starvsvenjing. Til heilsurøktara krevst heilsuhjálparaútbúgving ella onnur útbúgving og arbeiðsroyndir, sum svara til heilsuhjálparaútbúgvingina í longd.

Sum heilsurøktari kanst tú fara víðari til fysioterapeut, ergoterpeut, sosialráðgeva, sjúkrarøktarfrøðing ella námsfrøðing í Danmark. Flestu víðari útbúgvingar krevja tó ískoytislærugrein. Eisini ber til at útbúgva seg til sjúkraflutningstarvsfólk.



Starvspláss hjá heilsuhjálparum og -røktarum eru til dømis Nærverkið, Ellis- og røktarheim, Sambýli, Sum stuðul, Sjúkrahúsverkið, Psykiatriska økið.

Tað er stórur eftirspurningur eftir heilsuhjálparum og heilsurøktarum, tí er lætt at fáa arbeiðið eftir lokna útbúgving. Heilsuskúlin flytur væntandi í nýggj høli um ársskiftið 2008/09.

www.heilsuskulin.fo

# Fiskivinnuskúlin



Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er ein alternativ miðnámsútbúgving, ið gevur atgongd til víðari lesnað.

Útbúgvingin gevur eitt HIF prógv, sum kann sammetast við HH og HT. Tað er ein sonevnd yrkis-gymnasial útbúgving. Samstundis sum hon er vinnulísrættað er hon eisini lestrarfyrreikandi.

Prógvið gevur sostatt førleikar til bæði vinnulívsarbeiði og hægri lestur.

Undirvísingin er skipað soleiðis, at fyrsta árið er eitt støðisár og síðani eru tvey ár við bæði vallærugreinum og kravdum lærugreinum. Bæði yrkislærugreinum, men eisini vanligu gymnasialu lærugreinunum.

Hóast mong halda tað, so snýr Fiskivinnuskúlin seg ikki bert um fiskivinnu, men um vinnu og tilfeingi sum heild. Dentur verður serliga lagdur á matvørður, íverksetan og verkætlanararbeiði.

Fiskivinnuskúlin tekur ein flokk inn árliga, eftir summarferiuna. Tað vil siga, at umleið 22 næmingar byrja hvørt summar.

Í februar flytir skúlin í nýggj høli á bryggjuni í Vestmanna.

www.fiskvest.fo

# Vinnuháskúlin

Vinnuháskúlin bjóðar fýra útbúgvingar: Skipara, Skipsførara, Maskinist og Maskinmeistara.

Upptøka av næmingum fer fram tvær ferðir um árið, eftir nýggjár og eftir summarfrítíðina. Somuleiðis er próvtøka tvær ferðir um árið til allar útbúgvingar

## Maskinmeistari:

Maskinmeitaraútbúgvingin tekur 3 ár. Hon er bygd upp sum ein modulskipan, har modulini vara eitt hálvár. Hvørt hálvár vera undirvísingarmodul koyrd, sum í flestu førum enda við próvtøku við endan á hálvárinum. Næsta hálvár koyra so nøkur onnur modul. Útbúgvingin gevur førleika til fáa sjóvvinnubræv, tá ið krøvini til starvsvenjing eftir manningarlógini eru lokin. Hetta gevur rættindi at sigla sum maskinmeistari, við rang samsvarandi starvsvenjing, á øllum støddum av motorskipum.

## Maskinist:

Maskinistútbúgvingin tekur umleið 9 mánaðir. Her ganga næmingarnir fyrst í skúla í 1/2 ár, og fáa undirvísing í teknisku fakunum. Eftir próvtøku í tekniska fakunum, vera neyðug skeið tikin og tekur hetta á leið 3 mánar. Útbúgvingin gevur førleika til at sigla við rang upp til 2.maskinmeistara á øllum skipum, og við rang upp til maskinstjóra við skipum við framtøkumegi upp til 2999 kW, tá ið neyðug starvsvenjing er nádd.

## Skipari og Skipsførari:

Skúlagongdin til skipara tekur 1 1/2 ár. Upptøkukravið til skipara er, at tú hevur minst 12 mánaðar samlaða siglingstíð við skipum yvir 20 BT. 3 mánaðir av



hesum við fiskiskipum yvir 20 BT. Harafturat krevst góðkend sjón- og hoyrnaroynd (bláabók), sum er yngri enn 3 ár, og fráfaringarroynd fólkaskúlans við próvtalinum 6 í viðkomandi lærugreinum.

Skúlagongdin til skipsførara tekur 1 1/2 ár til skipara og síðani 1 1/2 ár til Skipsførara tað vil siga trý ár í alt. Upptøkukravið til skipsførara er, at tú hevur staðið útbúgvingina til skipara. Harumframt 6 mánaðir við skipum yvir 500 BT. Harafturat krevst góðkend sjón- og hoyrnaroynd (bláabók), sum er yngri enn 3 ár, fráfaringarroynd fólkaskúlans.

Skúlin lýkur STCW krøv, og tað merkir, at útbúgvingarnar eru á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim.

Í dag ganga yvir 200 næmingar á skúlanum.

www.vinnuhaskulin.fo